
Veðrið




Fimm – daga-for-søgnin frá DMI


Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Lítið lot av ymsum ættum, fyri tað mesta turt og onkrir sólglottar. Leygarnáttina fríska hann vindin av eystri til stívt andøvsgul og tað verður meira skýggjað Hitin millum 6 og 10 stig.



Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av eystri ella landnyrðingi, seinni minkar hann eitt sindur av norði. At byrja við skýggjað og helst nakað av regni, seinni klárar hann eitt sindur í. Hitin millum 7 og 12 stig.



Veðrið mánadagin og týsdagin:
Lot til andøvsgul, at byrja við ælaveður men onkrir sólglottar. Seinni veksur hann vindin av eystri upp í hvassan vind og regn. Hitin millum 5 og 13 stig.

Tvær nýggjar fløgur frá 3'aranum

DÁNIAL HOYDAL

Lena: Long distance
Ein útgáva við einum bólki, sum rætt og slætt eitur „Lena" sá dagsins ljós í gjár. Lena Anderssen og Niclas Johannesen, sum eru blivin par bæði so og so, geva hana út. Lena hevur skrivað orðini og Niclas hevur gjørt tónleikin.

Tey bæði hava arbeitt við fløguni í meira enn eitt ár nú við fløguni „Long Distance" og tey hava havt góð fólk afturat sær. Niclas hevur sjálvur produserað, lagt til rættis og upptikið fløguna. Síðan tóku tey hana við sær til Feedback Studio í Árhus at ljóðblanda tónleikin saman við Óla Poulsen.

Annars spæla m.o. Finnur Hansen, Johannus á Rógvu Joensen, Remi Fagereng, Regin Guttesen, Jan Zachariassen og Steve Gadd er eisini at hoyra onkrastaðni á fløguni.

Húsin, sum er rættiliga spennandi í sniði, er komin burturúr einum samstarvi millum Per á Hædd og Edvard Fuglø.

Lena er onkuntíð blivin rópt „Tað nýggja stjørnuskotið í føroyska tónleikaheiminum" fyri sína frálíku rødd og sermerkta stíl. Og Niclas er kanska besti rokkgittarleikari vit eiga í Føroyum.



Lena Anderssen og Niclas Johannesen geva út nýggju fløguna. Lena hevur skrivað orðini og Niclas hevur gjørt tónleikin




Hans Jacob spælir fyri tað mesta kent løg á fyrstu føroysku country-fløguni í ár

Hans Jacob & vinfólk: Country Gospel
Hetta er fyrsta føroyska countryfløgan í ár. Hans Jacob spælir fyri tað mesta kend løg við umsettum føroyskum teksti. Hon er í stóran mun eisini ein gospelfløga, tí innihaldið í tekstunum er religiøst allan vegin ígjøgnum.


Fløgan er upptikin í JacZak-studio í Havn og Bjarki Thomsen hevur tikið sær av ljóðnum saman við Jákupi Zachariassen.

Hans Jacob hevur eisini fingið fínar tónleikarar afturat sær, og fleiri teirra ganga aftur av hinari útgávuni, sum 3'arin gevur út í hesum døgum. Regin Guttesen á Wurlitzer, Remi Fagereng á trummum og Jákup Zachariassen hevur spælt alt møguligt. Mikkjal Joensen á bassi og Niclas Johannesen við gittara hava eisini stuðlað Hans Jacob á onkrum lagi.


Per á Hædd hevur tikið myndirnar og húsan hevur Jákup Zachariassen eisini gjørt á virkinum hjá sær Repro Z.




Eitt lágtrýst yvir Suður-Noregi fer í ein landnyrðing yvir Skandinavia og køld luft rekur framvegis av norði yvir Føroyar. Eitt hátrýst yvir Grønlandi liggur næstan í stað.



Um vikuskiftið verður eitt lágtrýst yvir Bretsku oyggjunum. Týsdagin nærkast eitt djúpt lágtrýst Íslandi av útsynningi, sum sendir regn og lýggjari luft yvir Føroyar.



Hitalagið mált frá 03./06. kl 06⁰⁰–04./06. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,5°C
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° Mesti hiti máldur í juni: **20,0°**



Avfallið: 0,0 mm – **mált frá 03./06. kl 06⁰⁰–04./06. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í juni: 2,1 mm

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	7
Nuuk	8
Qaqortoq	9
Ammassalik	2
Saint John's	12
Halifax	10
Reykjavík	11
Seyðisfjørður	3
Tórshavn	7
Lerwick	9
Aberdeen	9
London	15
Tromsø	5
Bergen	10
Oslo	10
Stokkhólm	9
Keypmannahavn	19
Helsinki	14
Moskva	25
Berlin	19
Warzawa	25
Kiev	23
Bukarest	26
Paris	19
Madrid	23
Róm	29
Malorca	31
Athen	28
Malta	33
Tunis	36
Beijing	22
New Dehli	40
Bangkok	35
Jakarta	31
Sydney	16
New York	18
Miami	30
Los Angeles	18
Meksikobýur	26
Panama	31
La Paz	–
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	18

Kelda: DMI

Vestfalskyrrindi

2. juni: Fyrra kvarter
5. juni: Mánin longst frá jørðini

	Suðuroyar-/Vágafirði fp	sp	Vestmanna-sundi fp	sp	Nólsoyar-firði fp	sp	Haraldssundi/ Leirvíksfirði fp	sp	Skúvoyarfirði/ Skopunarfirði fp	sp	Hestfirði/ Sundalagnum fp	sp
5. juni	0415	1635	0615	1835	0230	1450	0430	1650	0315	1535	0330	1550
6. juni	0455	1714	0655	1914	0310	1529	0510	1729	0355	1614	0410	1629
7. juni	0533	1753	0733	1953	0348	1608	0548	1808	0433	1653	0448	1708
8. juni	0613	1834	0813	2034	0428	1649	0628	1849	0513	1734	0528	1749



kurteisi og vinalag

Føroya stórsta úrval av
pakkitilfari
úr karton, bylgjupapp og plast
innan øll vinnuokir

Vit útvega eisini:
* **Plastbakkar**
* **Pakkibond, tape**
* **Merkir, etikettir**
* **Knívar**
* **Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.**
* **Ymisk tól til iðnaðin**
* **Reingerðisevnir**
* **Tilsetningarevnir**
* **Plattar**
* **Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari**

... sjálvandi fyri besta prísin!

FARPACK
P.O. Box 171,
FR-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 314295
Telefax (+298)319107/314968